# Minnislepi

## Byrja eitt forløb

Talgild heilsuskipan

<table>
<tr><th>STIG</th><th>SKÍGGJAMYND</th></tr>
<tr><td colspan="2">Eitt forløb (sjúklingagongd) í Gigni kann byrja upp á fleiri ymiskar mátar, men mannagongdin í Cosmic er tann sama. Munurin er serliga, hvør ger skrásetingina.<br>Tá tað eru nýføðingar, føddir í Føroyum, (føðideildini) verður forløbið byrjað hjá Gigni skrivstovuni.<br>Tá barnið er flutt til Føroyar aftan á føðing, ella forløbið er ikki stovnað í Cosmic enn (t.d. skúlabørn), verður tað gjørt av heilsufrøðinginum í økinum.<br>Hjá smábarnaheilsufrøðinginum verður umframt barnið eisini eitt foreldur (oftast mamman) stovnað í Cosmic.<br>Her er umráðandi, at Gigni fylgir føstum arbeiðsgongdum.</td></tr>
<tr><td>Leita borgaran fram í patientlinjuna.<br><br>Vel Patientadministration – Kontaktregistrering<br><br>Í hesum døminum verður eitt forløb stovnað til ein nýføðing</td><td>
</td></tr>
<tr><td>Á høgru síðu á skíggjanum síggast ymiskir teigar at útfylla.<br><br>Trýst á teigin, har tað stendur Henvisning*<br><br>Og vel Ny henvendelse uden henvisning úr úrvalinum</td><td>
</td></tr>
</table>

Nú opnar ein kassi á skíggjanum.

Her skalt tú velja navnið á forløbinum.

Trýst á **Forløbsnavn*** og vel Gigni - barn ella Gigni foreldur/verji úr úrvalinum







Trýst síðani á høgru síðu á kassanum, har tað stendur **Gigni ávíst/ur fyri**



<table>
<tr>
<td>Vel úr úrvalinum<br><br>og trýst síðani Accepter knøttin sum er niðast í kassanum</td>
<td>
</td>
</tr>
<tr>
<td>Fyll síðani teigarnar út, sum hava eina *.<br><br>GG viðv. Aktivitet: um ávísingin ikki verður gjørd í samband við kontakt við borgaran, vel so Umsiting.<br><br><br><br><br><br>og trýst á Gem knøttin, sum er niðast í høgra horni.</td>
<td>


</td>
</tr>
</table>